Álit

í

løgtingsmáli nr. 84/2023: Uppskot til løgtingslóg um føroyskan førleikakarm

Landsstýrismaðurin í barna- og útbúgvingarmálum, Djóni Nolsøe Joensen, hevur lagt málið fram 7. mars 2024 og eftir 1. viðgerð 19. mars 2024 er tað beint Mentanarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 21. mars og 3. og 10. apríl 2024.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Fróðskaparsetur Føroya, Meginfelag Føroyskra Studenta og landsstýrismannin í barna- og útbúgvingarmálum, Djóna Nolsøe Joensen, saman við Undirvísingarstýrinum.

Við hesum uppskoti fæst heimild at lýsa og greina allar prógvskyldugar og førleikagevandi útbúgvingar í Føroyum, so tær kunnu samanberast við útbúgvingar í øðrum londum.

Førleikakarmurin skal innihalda átta førleikastig, sum útbúgvingarnar skulu liva upp til. Førleikastigini verða lýst nærri í førleikakarminum, men skulu byggja á vitan, hegni og førleikar. Førleikakrøvini verða stigvís fyri at tryggja, at endurtøkur í læru ikki koma fyri, tá næmingur flytur uppeftir í skúlaskipanini.

Námsskipanir og námsætlanir skulu hava eina greiða tilvísing til førleikastigini í karminum.

Verður heimildin at gera ein føroyskan førleikakarm latin, skulu allar útbúgvingar flokkast eftir nýggju skipanini, og tað arbeiðið er klárt at fara undir.

Uppskotið hevur ikki stórar broytingar við sær fyri útbúgvingarnar í Føroyum. Verður uppskotið samtykt, skulu prógv vísa til galdandi førleikastig, námsætlanir skulu lýsa, hvussu lesandi fáa teir førleikar, karmurin treytar, og skjøl kunnu leggjast við prógvum, sum lýsa førleikakarmin og føroysku útbúgvingarskipanina, so tað verður lættari hjá arbeiðsgevarum og útlendskum útbúgvingarstovnum at skilja, hvørja útbúgving talan er um.

Ein føroyskur førleikarkarmur er ein liður í einum størri arbeiði at altjóðagera tað føroyska útbúgvingarverkið. Millum annað er kravt, at Føroyar hava ein førleikakarm, skulu vit gerast partur av Bolognaavtaluni, sum er ein millumtjóðaavtala um hægri útbúgvingar, og Erasmus+ skipanini, sum er ein ES-skrá, sum millum annað stuðlar skiftislestri.

Tá førleikakarmurin er gjørdur og vit beinleiðis kunnu samanbera okkara útbúgvingar við útbúgvingar í útlondum, gerst tað lættari at flyta næmingar millum lond, tá tey til dømis hava tikið ein part av útbúgvingini í Føroyum, tí útbúgvingin í Føroyum kann samanberast við tilsvarandi í landinum, sum næmingurin søkir sær til.

Harafturat átti tað eisini at blivið lættari hjá útlendskum næmingum at søkja til Føroya, tá útbúgvingarnar, ið verða bodnar út her, kunnu setast í mun til aðrar, og støðið á teimum er lýst.

Uppskotið hevur ávísar umsitingarligar avleiðingar við sær fyri landið, millum annað skulu námsætlanir, námsskipanir, lógir og kunngerðir endurskoðast. Mett verður, at arbeiðið kann gerast innanfyri núverandi játtan á økinum og er tí útreiðsluneutralt.

Samanumtikið er hetta eitt jaligt stig á leiðini hjá okkara útbúgvingarverki at gerast partur av størri millumtjóðaavtalum um útbúgvingar.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Mentanarnevndin, 17. apríl 2024

Sólvit E. Nolsø formaður	Jóhannis Joensen næstformaður	Súsanna Bertholdsen
Liljan Weihe	Erling Eidesgaard	Magnus Rasmussen
	Bárður á Lakjuni	